# 500 til Týsklands

**Fótbóltssambandið roknar við, at 500 føroyingar vera á Niedersachsen Stadion í Hannover hin 16. oktober, tá føroyingar hitta týskarar í altjóða fótbólti**

LANDSDYSTUR

*Heri á Rógvi*



*Hóast teir føroysku litirnir og teir føroysku áskoðararnir vera nógv minni í tali enn teir týsko, so skuldi føroyingarnir kunnu gjørt vart við seg í Hannover 16, oktober.*

Hin 16. oktober, um tólv dagar, fara føroyska A-landsliðið hjá monnum í fótbólti og besta liðið týskarar eiga í fótbólti á vøllin í Hannover.

Tað kenda Niedersachsen Stadion verður karmur um dystin. Hóast tað verður rópt fyri Niedersachsen Stadion millum manna, er almenna navnið á leikvøllinum nú AWD Stadion. Hetta hendi eftir at navnið á leikvøllinum varð selt, sum tað ofta verður í útlondum. Týska fjarskiftisfyritøkan AWD keypti so navnið, soleiðis at 500 føroyingar um góðar tólv dagar kunnu siga, at teir hava verið á AWD Stadion í Hannover.

Á AWD Stadion er pláss fyri góðum 40.000 áskoðarum. Leikvøllurin verður í løtuni umbygdur til HM-endaspælið, sum verður í Týsklandi í 2006. Sambært týskum fjølmiðlum er útselt til dystin móti Føroyum 16. oktober. Áhugin er sum vera mann stórur í Týsklandi. Talan er um hin fyrsta heimadystin, eftir at landið gjørdist nummar tvey í HM-endaspælinum í summar.

### 1/80

Til ein tílíkan dyst sum tann í Hannover 16. oktober fær Fótbóltssamband Føroya eitt ávíst tal av atgongumerkjum.

Ísak Mikladal, aðalskrivari í Fótbóltssambandinum, sigur, at teir hava fingið 1.050 atgongumerki til dystin. Tá avtornar roknar Ìsak Mikladal við, at teir eru slopnir av við eini 500 atgongumerki. Hetta merkir sostatt, at 1/80 partur av áskoðarunum vera væntandi føroyingar.

Hann upplýsir, at teir hava sent heilt fitt av atgongumerki til Danmarkar og til aðrar føroyingar uttanlands. Roknað verður sum sagt við góðum 500 føroysku áskoðarum til dystin. Tað kunnu tó vera nakrir føroyskir áskoðarar, sum hava keypt atgongumerki beinleiðis úr Týsklandi, men hesir eru so ikki tald uppí tey 500.

Allir føroyingarnir sleppa at sita saman til dystin. Skuldi nakar lagt í at vita tað, so er tað í sektión M45, at føroysku áskoðararnir fara at sita, tá dysturin verður hin 16. oktober. Sambært Ísaki er talan um hampuliga góð pláss.

Eini 200 eru við í ferðalagnum hjá 12. manni. Eisini fleiri ferðaskrivstovur skipa fyri ferðum til Týsklands í sambandi við dystin, og nógv fólk, búsitandi uttanlands, fara eisini til dystin.

Regin Egholm, formaður í 12. manni, sigur, at hetta er største ferðalagið hjá teimum til ein tílíkan dyst. Tó vóru fleiri føroyskir áskoðarar í Skotlandi og í Danmark á sinni.

Enn eru nøkur pláss eftir hjá 12. manni.

### Gott fyri Fótbóltssambandið

Fótbóltssambandið hevur frá byrjan av gjørt greitt, at Týskland er eitt ynskiligt mótstøðulið sæð útfrá tí fíggjarliga sjónarmiðinum.

Ísak Mikladal upplýsir, at Fótbóltssambandið hevur havt undirskot uppá landsliðið seinastu árini, men í hesari undankappingini verður væntandi yvirskot á niðastu linju, tá dystirnir eru leiktir.

Týska fótbóltslandsliðið merkir millióna inntøkur í sjónvarps- og lýsingarrættindum. Nevnast kann, at dysturin millum Føroyar og Skotland herfyri varð vístur beinleiðis í týskum sjónvarpi eisini.

Eisini áhugin hjá týskum viðhaldsfólkum er stórur at koma til Føroya. Ísak Mikladal sigur, at væntandi er, at um 1.000 áskoðarar koma til Føroya til heimadystin hjá Føroyum móti Týsklandi hin 11. juni 2003 á Tórsvølli.

Lesið eisini samrøðu í blaðnum í morgin við Sissal Kristiansen, sum samskipar tiltøkini í sambandi við landsdystirnar hjá føroyska fótbóltslandsliðnum.

# Sáttmálin undirskrivaður fyri Bussleiðina

**Sáttmálin um koyring av Bussleiðini í Tórshavnar kommunu er nú endaliga komin upp á pláss**

BUSSLEIÐIN

*Heri á Rógvi*

Eftir drúgt stríð er nú komið á mál í søguni um Bussleiðina í Tórshavnar kommunu. Býráðið í Havn gjørdi av at bjóða Bussleiðin út í almennari útbjóðing. Bjóðast kundu um einkultar leiðir ella allar leiðirnar. Tá avtornaði átti Mourtitsens Bussar lægstu tilboðið saman við Gundurs Bussum.

Hetta hóvaði kortini ikki øllum, og bussførarnir í Havn møttu mansterkir í býráðsfundi fyri at mótmæla ætlanunum hjá býráðnum. Eisini andstøðuni í Tórshavnar býráð, t.e. Tjóðveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin, dámdi uppskotið ógvuliga lítið.

Hóast mótmæli, so gjørdi meirlutin av at taka av tilboðnum frá Mourtitsens Bussum, og farið varð undir samráðingar.

Samráðingarnar eru nú komnir so langt, at Mourits Mouritsen frá Mouritsens Bussum nú hevur skrivað undir sáttmálin, og áðrenn leingi hevur Jan Christiansen eisini skrivað undir sáttmálan.

Hetta upplýsir Bogi Haraldsen á teknisku deild hjá býráðnum fyri Sosialinum.

Mouritsens Bussar og Gundurs Bussar taka yvir Bussleiðina í Tórshavnar kommunu frá 1. februar 2003 at rokna. Sáttmálin er galdandi til 31. januar 2010.

Mourtitsens bussar og Gundurs bussar hava boðið at røkja Bussleiðina í Tórshavnar kommunu fyri í alt 10.710.843 kr. Talan er um leiðirnar 1,2 og 3 í Havn og 4/4x í Kollafirði og Kaldbak. Hetta verður eisini teir pengarnir, ið hesir báðir veitararnir fáa árliga fyri at røkja Bussleiðina. Allar ferðaseðlainntøkur fella til Tórshavnar kommunu.

Bogi Haraldsen sigur, at nú skulu samráðingar vera um keyp av teimum verandi bussunum, og aðrir broytingar, m.a. ein nýgg ferðaseðlaskipan og møguligir hægri ferðaseðlaprísir, liggja fyri framman, men ógreitt er nú, nær hetta verður.



*Samráðingarnar um Bussleiðina í Havn eru nú endaliga lidnar, og 1. februar verður farið undir at koyra við Mouritsen og Gundur sum entrepenørum.*

# hygg & hoyr

**Frá fríggjadegi 4. oktober til hósdagin 10. oktober**

## Borð um borð 6/7




*Síðsta sunnukvøld funnu vit fyrru finalistarnar í spurnarkappingini "Borð um borð". Sunnukvøldið finna vit seinnu finalistarnar. Luttakararnir hesa ferð eru fýra løgtingsmenn, sum tó ikki stilla upp eftir flokksmørkunum. Á liði A er klaksvíkingurin Vilhelm Johannesen og Nikláí Petersen úr Kollafirði. Á liði B eru ein havnarmaður og ein vágbingur, nevnliga Jógvan Arge og Henrik Old. Vertur er Leivur Hansen og dómari Marius Rein.*

## Skúlagáttin




*Á nýggjárinum boðaði landsstýrismaðurin í mentamálum Óli Holm frá, at árið skuldi verða árið hjá tí góða fólkaskúlanum. - Skúlagáttin fer at spyrja núverandi landsstýrismann í undirvísingar- og mentamálum, Annlis Bjarkhamar, hvat liggur í hugtakinum "hin góði fólkaskúlin". Hvørji krøv setur hon tí góða fólkaskúlanum, og hvussu fer Mentamálaráðið at seta sjøtil á arbeiðið við tí lýsta góða fólkaskúlanum. Nortið verður eisini við læraraútbúgvingina. - Í sendingini medvirka eisini Gyðja Hjalmarsdóttir, Elinborg Joensen og Pauli Nielsen.*

*Birgir Kruse leggur til rættis.*

## Politiski Pallurin




## Fólk og frítíð




## Pyjamasbananirnar




## Gesturin

